SUMMARROK Í DADDUNI
BYRJAR HÓSDAGIN KL. 09.00
HÓPIN AV RESTSTØDDUM
-40% -50%

DADDAN
Á Hálsi - Smyrilsvegur 7 - Tórshavn

# Ferðin var í ovara lagi

**Ikki er gott at vita, at hvat bilførarin hugsaði og ætlaði hesa náttina. Men tá løgreglan máldi ferð hansara var hon heilt uppi á 164 km. um tíman!**

Ferð
*Snorri Brend*

Við jøvnum millumbilum ger løgreglan ferðkanningar kring landið, og soleiðis varð eisini gjørt náttina til leygardagin.

Tá var løgreglan úti við hesi serstøku útgerðini og máldi ferðini á vegnum fram við Kaldbaksbotni. Og tað var ikki hissini fong teir fingu hesa løtuna.

Ein bilførari varð máldur til at hava koyrt eftir hesum vegastrekkinum við meiri enn dupultu loyvdu ferðini: 164 km./.

Hann fær í fyrsta lagi eina bót fyri hetta álvarsliga brotið á ferðslulógina, og fær haraftrat ein treytaðan dóm við øllum tí, sum hartil fylgir.

Vakthavandi á Politistøðini í Havn í morgun dugir ikki at siga, um hetta er tað mesta teir nakrantíð hava mált í Føroyum.

- Men tað er í øllum førum í ovara endanum, svaraði hann.

# 21 sigoynarar endaðu aftur í Danmark

**Ein bólkur av rumenskum sigoynarum ætlaðu at søkja um politiskt friðskjól í Íslandi. Men ferð teirra við Norrönu endaði ikki har sum tey ætlaðu, nevniliga á Seyðisfirði, men í Hanstholm.**

Útlendingar
*Snorri Brend*

Ferðafólkini umborð á Norrönu undraðust helst almikið á hesi heldur óvanligu ferðafólkini.
Tey vóru komin umborð á skipið, men tóktust hvørki hava kamar ella koyggjuplásass, og lógu tí og svóvu ymsastaðni umboð, á gongini ella har pláss var fyri teimum.

Hesir 21 rumenarnir høvdu í kvittanini at biðja um politiskt friðskjól. Tey komu umborð í Bergen, og ætlaðu bara at fylgja við skipinum alla leiðina norður til Íslands at fremja ætlan sína. Men so gjørdist ikki.

Tá Norröna kom til Íslands vórðu tey – ikki óvæntað - avvíst, og máttu tí fyrst fylgja við skipinum aftur á Havnina. Her varð skipað so fyri, at tey heldur ikki fingu ørindi síni avgreidd, men máttu við skipinum aftur til Danmarkar.

Framhald á bls. 35



Eitt virðiligt starv

Kaupthing søkir eitt fólk til ráðgeving og kundarøkt innan fyri virðisbrævaøkið.

Tín uppgáva verður at røkja sambandið við okkara viðskiftafólk. Ein umráðandi partur av arbeiðinum er at leggja skilagóðar og lønandi ætlanir fyri teirra íløgur. Umframt at ráðgeva teimum, vit longu samstarva við, skalt tú eisini leita upp hugsandi viðskiftafólk. Vit stremba eftir varandi viðurskiftum við okkara viðskiftafólk, og tí er álit eitt lykilorð.

Til starvið krevst, at tú ert álitisvekjandi og megnar at skapa virðing um tín persón. Tú ert útvendur og samskiftir lættliga við øll. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt, tær dámar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti.

Tú hevur eina hóskandi hægri útbúgving og hevur stóran áhuga fyri íløgum í virðisbrøv. Góðar arbeiðsroyndir á økinum eru ein fyrimunur, men als eingin treyt. Eisini dugir tú væl, bæði í skrift og talu.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv á fakliga høgum stigi í einum dynamiskum felagi í støðugari menning. Tú kemur at uppliva ein góðan samstarvsanda í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har atlóða møguleikarnir eru góðir.

Lønin verður eftir avtalu. Hevur tú annars okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at venda tær til Peter Holm, stjóra í Kaupthing í Føroyum.

Send eina umsókn innan 15. august til:

Kaupthing
Virðisbrævamaklarafelag
Tinghúsvegur 14
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing er leiðandi innan fyri virðisbrævamarknað og vinnuveitarar í Føroyum. Felagið ráðleggur og rekur fyri vinnu, stovnar og privatar íleggjarar og er størsta virðisbrævamaklarafelag í Føroyum. Kaupthing er millum 10 teir størstu bankarnar í Norðurlondum umframt deildir í London, New York, Genova og Luxembourg. 12 fólk starvast í Kaupthing í Føroyum.

www.kaupthing.fo

KAUPTHING
Virðisbrævamaklarafelag